LM-099/2023

Fylgiskjal 87

Til Uttanríkis- og Vinnumálaráðið:

Ein meiriluti Sunda Kommunu hevur hesar viðmerkingar í sambandi við uppskotið um burðardygga ferðavinnu.

Vit meta okkara øki í Sunda Kommunu hava ein stóran leiklut í verandi og framtíðar ferðavinnu. Kommunan telur ellivu ymiskar bygdir og fevnir landafrøðiliga sera vítt. Vit hava helst tríggjar av mest ferðavitjaðu bygdunum í landinum, og har við merkir ferðavinnan nærumhvørvið hjá okkum nógv. Vit síggjast stórar møguleikar í framtíðar ferðavinnu, men ásanna somuleiðis, at økið í dag hevur avbjóðingar við ferðavinnuni, serliga í summarhálvuni. Tí ynskja vit sum ein meiriluti av býráðnum at koma við hesum viðmerkingum, sum vit hava deilt í fimm høvuðstættir.

Kommunali leikluturin, tá talan er um ferðavinnu.

Endamálið við at menna ferðavinnu má verða, at aktørar skulu fáa vinnuligan rakstur í virksemið. Í Sunda Kommunu meta vit ikki, at tað er okkara leiklutur at dríva ferðavinnu. Ein kommuna kann vera við til at skapa karmar, men skal ikki blanda seg upp í vinnuliga partin av virkseminum. Taka vit støðuna í dag, so hava vit longu í dag ein virknan leiklut sum kommuna úti á okkara smáplássum, millum annað við at hava almennar vesiumstøður og vasking av hesum, umframt at skelta og gera parkeringspláss inni í bygdunum. Hetta er ein ábyrgd vit longu hava átikið okkum, tí vit sum kommuna viðurkenna, at fólkini vitja okkara bygdir. Tó meta vit við hesum uppskotinum, at ov nógv umsitingarlig ábyrgd verður løgd út á kommununar. Tað verður torført hjá okkum í Sunda Kommunu at fáa alt í lag og semju um tað, sum stendur í hesum uppskotinum. Út yvir tað kemur hetta at verða ein alt ov stór figgjarlig og umsitingarlig byrða fyri okkara kommunu.

Samferðslan í økinum.

Í Sunda Kommunu hava vit, sum áður nevnt, tríggjar av teimum mest vitjaðu bygdunum í landinum, men nógvar aðrar smáar bygdir verða ávirkaðar av stóra talinum av ferðafólki og bilum, ið ferðast gjøgnum bygdirnar. Tá tú ferðast til Saksunar koyrir tú gjøgnum Hvalvík, og tá tú koyrir til Tjørnuvíkar koyrir tú gjøgnum Langasand og Haldórsvík. Sostatt verða seks av ellivu bygdum í kommununi sera ávirkaðar av avleiddu ferðsluni, ið ferðavinnan hevur við sær í dag. Í Hvalvík er landsvegur, og kommunan hevur heitt á LV at gera ferðsluforðingar, men hetta uttan úrslit, tí tað sigst ávirka kavaruddingina hjá LV. SK hevur eisini spurt LV at gera rulluportur báðu megin við bygdina Haldórsvík, so vit kunnu vetrarfriða bygdina og leiða seyðin burtur av bygdavegnum og úr bygdini, men hetta uttan úrslit, tí rulluportur sigst kosta ov nógv í viðlíkahaldi. Eisini í Haldórsvík og gjøgnum Langasand hava vit roynt at fingið ferðsluforðingar, tí ferðin er ov høg, men somuleiðis her uttan úrslit.

Okkara niðurstøða er við hesum heilt greitt, at landsmynduleikarnir ikki hava tikið hesar avbjóðingarnar við ferðslutrygdini gjøgnum okkara bygdir í nóg stórum álvara. Við hesum uppskotinum síggja vit ongar batar frá landsins síðu, sum skal tryggja betur samferðslu og ikki minst samferðslutrygd úti á smáplássunum.

LM-099/2023

Býtið av inntøkuni frá náttúrugjaldinum.

Uppskotið, sum fyriliggur, hevur við sínum treytum fyri okkara kommunu sera stóra ávirkan og fer ikki at hanga saman fíggjarliga, og umframt tað er bara ein % býtislykil í uppskotinum, men eingi faktuel tøl at fyrihalda seg til. Uppskotið hevur heldur ongan býtislykil inni, sum sigur hvussu upphæddin skal býtast millum kommununar. Út yvir hetta stendur m.a, at ein fjórðingur skal býtast út til bygdafólkið. Hetta meta vit vera skeivt, tí bygdafólkið/staðbundna nevndin skal ikki hava útreiðslur av ferðavinnuni, og har við heldur ikki inntøkurnar av einum náttúrugjaldi. Samsvar má verða millum tey, sum bera útreiðslurnar og tey, sum móttaka inntøkurnar. Uppskotið sigur heldur einki um, á hvørjum grundarlagi býtið av inntøkuni skal verða.

Lógaruppskotið førir til at Landsstýrisfólkið hevur ov stóra ávirkan á útjaðarin gjøgnum kunngerð.

Lógin hevur 18 ymiskar paragraffir, men heili níggju ferðir verður orðað, at landsstýrismaðurin kann, skal ella ásetur við kunngerð. Hetta meta vit verða ov ógreitt og ótrygt hjá teimum, sum arbeiða undir hesari lógini, t.e. kommunur, jarðareigarar/festarar og vinnuligir aktørar. Reglurnar eru hesar:

Landsstýrisfólkið ásetur í kunngerð nærri krøv til ferðaleiðarar á ávísum støðum.
Landsstýrisfólkið kann í kunngerð áseta nærri reglur fyri, hvussu farast skal fram, tá ið farleiðir verða gjørdar.
Landsstýrisfólkið skal góðkenna skilhaldsreglurnar, sum kommuna í samráð við eigara ella brúkara kunnu áseta, og lýsa tær í kunngerð.
Landsstýrisfólkið kann í kunngerð áseta reglur um, at tað í økjum, har serliga vandamikið er at ferðast, bara skal vera loyvt at ferðast við staðkendum fólki.
Landsstýrisfólkið kann í kunngerð áseta, at serliga vandamikil øki av trygdaráum skulu vera heilt ella partvíst stongd fyri ferðslu ávísa tíð á árinum ella samdøgrinum.
Landsstýrisfólkið ásetur í kunngerð nærri reglur um, hvussu avmarkingar av ferðslu og uppihaldi, sum órógva serligt landbúnaðarvirksemi ella veiðu, verða almannakunngjørdar.
Landsstýrisfólkið ásetur upphæddina á náttúrugjaldinum í kunngerð.
Landsstýrisfólkið ásetur í kunngerð nærri reglur um, hvussu inntøkan verður býtt millum partarnar.
Landsstýrisfólkið ger standard avtalu, sum er galdandi fyri virksemið. T.e. handilslig ferðavinna, ið skal útinnast í samráð við eigara ella brúkara.

Vit meta at landsstýrisfólkið, sum skiftir frá tíð til tíð, hevur ov stóra ávirkan á ferðavinnuna úti á smáplássunum, sum verða ávirkað av gerandis ferðavinnuni. Her meta vit tað hava stóran týdning, at man tekur lokala fólkið við í viðgerðina, tá man ásetur t.d. serliga vandamikil støð at ferðast, tí lokala fólkið kennir økið betur enn flest onnur.

Niðurstøða:

Meirilutin av býráðnum í Sunda Kommunu mælir frá at samtykkja lógaruppskotið um burðardygga ferðavinnu. Uppskotið er ov stýrt úr miðstaðarøkinum, meðan fíggjarligu og trivnaðar avbjóðingarnar koma at merkjast úti á smáplássunum. Uppskotið setur kommunu, jarðareigarar/festarar og lokala fólkið á smáplássunum meira upp ímóti hvørjum øðrum enn samantvinnar tey. Uppskotið hevur stórar fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri kommununa. Verður hetta samtykt síggja vit sum býráð ongan annan møguleika, uttan at skerja grundleggjandi tænastur til okkara borgarar í kommununi, ella at hækka skattaprosentið munandi. Hvørgan av teimum gagnar fólkinum í økinum.

Vit mæla til, at uppskotið verður tikið aftur, og síðani verður nýtt uppskot sett fram, sum staðfestir rættin hjá øllum føroyingum at ganga frítt í egnum landi, sjálvsagt uttan at tað ávirkar verandi landbúnaðarvirksemi í harutíð, fjalltíð og øðrum. At ein fráboðanarskipan verður gjørd í samráð við Jarðir, har bøndur, røktingarfólk og festarar lættliga kunnu boða frá, at rakstur, haruskjóting ella tílíkt er á skránni, og at hendan fráboðanarskipan verður virð. Verður hon ikki tað skal møguleiki vera at sekta viðkomandi, tí hetta ávirkar virksemið á økinum. Eisini mæla vit til, at landið átekur sær uppgávuna at skipa samferðsluna út til smábygdirnar og fær loyst tær avbjóðingar, sum eru við samferðsluni til bygdirnar í dag. Til seinast mæla vit í Sunda Kommunu til, at man letur kommunur, lokala fólkið og aktørar sjálvi skipa seg úti á sínum smáplássum. Við hesum taka øll sín part av ábyrgdini at skipa framtíðar ferðavinnu í Føroyum.

Styttingar:
SK: Sunda Kommuna
LV: Landsverk

Vegnað meirilutan av býráðnum í Sunda Kommunu

Eyðstein Zachariasen
Varaborgarstjóri

Meirilutin av býráðnum í Sunda Kommunu:

Eyðstein Zachariasen
Ingolf Joensen
Vinjard Dam
Marni E. Joensen
Rúni Kruse
Haraldur S. Hammer
Trygvi Kallsoy
Kári Matthíasson